# Dimmalætting

7 kr.

NR. 144 • Týsdagur 15. november 1994 • 117. árgangur • Tlf. 11212




Ólavur Rasmussen, prestur, er settur í starv sum nýggjur leiðari í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Hann tekur við starvinum 1. mars 1994

## Ólavur Rasmussen nýggjur leiðari í Føroyahúsinum

Starvsnevndin fyri Føroyahúsið í Keypmannahavn hevur sett 36 ára gamla Ólav Rasmussen í starvið sum leiðari í húsinum. Ólavur Rasmussen fer í framtíðini at leggja størri dent á mentanarvirksemið, enn undanfarni leiðarin gjørdi.

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN

Ólavur Rasmussen sigur í viðmerking við *Dimmalætting*, at hann fyrst og fremst fer at arbeiða fyri, at samskipa alt virksemið í Føroyahúsinum. Í øðrum lagi fer hann at leggja dent á, at fáa Føroyahúsið at virka sum ein mentanardepil, samstundis sum fleiri tiltøk skulu vera í húsinum.

– Eg kundi hugsa mær at fingið Føroyahúsið at virka á leið sum Norðurlandahúsið í Havn – tó ikki í fullan mun sjálvandi, sigur Ólavur Rasmussen.

### Byrjar 1. mars

Nýggi leiðarin byrjar í starvinum 1. mars 1995. Hann er prestlærdur, og hevur seinnu árini starvast við donsku sjómanskirkjuna í London. Áðrenn hann byrjaði í starvinum í London, starvaðist hann sum sóknarprestur í Husum í Suðurslesvig.

Bæði sjómanskirkjan í London og kirkjan í Husum virka sum annað og meira enn kirkjur. Talan er jú um kirkjur, ið sonevndir minnilutabólkar nýta. Tískil hava kirkjurnar virkað sum mentanarmiðdeplar hjá dønum í London og í Husum. Ólavur hevur soleiðis ávísar royndir í at reka ein mentanardepil.

Nakrar mánaðir í summar avloysti hann Martin Restorff Jacobsen, sóknarprest í Norðstreymoyar prestagjaldi; eitt ár starvaðist hann sum útvarpsmaður í Útvarpi Føroya, og trý ár var hann sjómaður.

Hóast formaðurin í starvsnevndini fyri Føroyahúsið, Elsa Jóhanna Høgenni, leggur dent á, at nevndin ikki hevur sett prestin, men persónin, Ólav Rasmussen, í starv, so metir Ólavur seg kunna nýta allar sínar starvsroyndir, eisini sum prestur.

– Sum prestur møtir tú alskyns fólki. Tær royndirnar koma væl við í einum starvi sum leiðari í Føroyahúsinum, har ein rúgva av ymsum fólki kemur inn á gólvið, heldur Ólavur Rasmussen.

# Ídnaðarskipini givin

Øll átta ídnaðarskipini hava gjørt av at steðga fiskiskapinum. Formaðurin í felagnum Ídnaðarskip, Jóhan Christiansen, sigur, at hjáveiðan av hýsumurti var so mikið nógv, at neyðugt var at steðga á eina tíð.

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN

Felagið Ídnaðarskip hevði fund við landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Ivan Johannesen, og Hjalta í Jákupsstovu, stjóra á Fiskivinnustovuni, seinnapartin fríggjadagin.

Partarnir løgdu sjónarmiðini fram, og semja var um, at hjáveiðan av hýsu var so mikið nógv, at neyðugt var at steðga við fiskiskapinum eina tíð. Semja var samstundis um, at tað ikki er ídnaðarveiðan, sum seinnu árini hevur ført til lutfalsliga lítla hýsustovnin.

Jóhan Christiansen sigur, at støða ikki er tikin til, hvussu leingi steðgurin skal verða.

– Vit hava samband við landsstýrið, og eg væntí at avgerð verður tikin skjótt, sigur Jóhan Christiansen.

Hann vísir á, at einar fjøruti familjur eru tengdar at ídnaðarskipunum. Aftrat teimum koma tey, ið arbeiða veiðuna á virkinum í Fuglafirði. So í alt er talan um nógv arbeiðspláss, steðgar ídnaðarveiðan fullkomiliga upp.

# Óvist um oljufyrisitingin flytur í bókasavnshúsini

Undanfarna landsstýrið gjørdi av, at Oljufyrisitingin skuldi flyta inn í gomlu Bókasavnshúsini, t.e. húsini, har forngripagoymslan hevur verið í mong ár. Men mong eru ímóti, at oljufyrisitingin flytur í henda stásiliga bygningin, og fleiri mæla til at flyta setursskrivstovuna inn í húsini í staðin.

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN

Í løtuni eru arkitektar í holtur við at broyta gomlu sethúsini, Danmarks Geologiske Undersøgelse, hevur hildið til í. Endamálið við umbyggingini er, at setursskrivstovan saman við rektaranum á setrinum, skal flyta inn í gomlu sethúsini.

Gunnleyg Durhuus, landsarkitektur, váttar, at umbyggingar fara fram, og at setursskrivstovan ætlandi skal flyta inn.

– Men nær tað verður, og um tað yvirhøvur verður til nakað, tori eg ikki at siga við vissu, sigur landsarkitekturin.

### Undrast

Á setursskrivstovuni undrast tey um ætlanirnar. Rektarin var burturstaddur í gjár, men ein av skrivstovukonunum endurgav tað, rektarin segði í einum fyrilestri herfyri. Rektarin vísti í fyrilestrinum á, at Fróðskaparsetrið mangan fær útlendska vitjan, og tá er lítið sømiligt at bjóða gestunum inn í eini gomul sethús.

Í eini grein í *Dimmalætting* í oktober í ár viðger Jóan Pauli Joensen hølisviðurskiftini:

– Eg rokni við, at teir, sum í síni tíð reistu bókasavnshúsini, høvdu dámt sera væl, at lítla føroyska universitetið flutti inn í hábærsligu Bókasavnshúsini – tað hevði verið í teirra anda, segði rektarin á Fróðskaparsetri Føroya, Jóan Pauli Joensen, í grein fyri kortum.

Jóan Pauli Joensen heldur, at Oljufyrisitingin átti at funni onnur høli enn gomlu bókasavnshúsini, tí húsini eru mong, sum í hesum døgum standa tóm.

Rektarin vísti í greinini hendan dagin á ein fund, hann hevði við Maritu Petersen, tá hon framvegis var landsstýrismaður í skúla- og mentamálum.

– Eg var ein dagin, saman við stovnsleiðarum fyri Fornminnissavnið og Náttúrugripasavnið, á fundi við landsstýrið um hølisviðurskiftini. Har varð skotið upp at kanna møguleikarnar fyri, at Føroya Fornminnissavn flutti framsýningar sínar í gamla Listaskálan.

– Skotið varð eisini upp, at Náttúrugripasavnið skuldi fáa alt Neystið ella Bátasavnið til sínar framsýningar, og at gomlu bókasavnshúsini í framtíðini skuldi verða høvuðsbygningur hjá Fróðskaparsetri Føroya, segði Jóan Pauli Joensen, rektari, m.a. í greinini í oktober.

Síðani er tað hent, at Føroya Fornminnissavn er flutt í húsini hjá Málingahandlinum í Hoyvík. Tað er sostatt framvegis ikki ov seint at broyta verandi ætlanir.

Hvussu er og ikki; í løtuni fara umbyggingar fram hvørs endamál er at setursskrivstovan skal flyta inn í eini gomul sethús, meðan Oljufyrisitingin ætlandi skal flyta inn í tann annars hábærsliga lærda háskúlan.



Tað er heldur óvist, hvørt Oljufyrisitingin yvirhøvur flytur inn í gomlu bókasavnshúsini. Flestu halda tað vera heilt burtur við, og onkur mælir til at Fróðskaparsetrið flytur inn í staðin

# Ein søgulig stórhending, at sviar hava játtað at taka lut í europeiskum politikki

– Og hetta er eisini ein stór broyting í norðurlandasamstarvinum tá havt verður í huga, at Danmark síðan 1973 hevur verið einsamalt norðurland í ES. Nú eru tvey norðurlond komin aftrat. Tann norðurlendska tyngdin, sum leingi hevur verið talað um, og sum ein hevur mett so týdningarmikla, er nú til staðar í europeiska samstarvinum, sigur Edmund Joensen, løgmaður, sum viðmerking til úrslitið av svensku ES- fólkaatkvøðuni sunnudagin

PÓL Á KLETTI

Sunnudagin var fólkaatkvøða í Svøríki um limaskap í ES. Eins og í Finnlandi var meirluti í Svøríki fyri limaskapi, stívliga 52%. Úrslitið fer uttan iva at ávirka støðuna í Noregi so at møguliga eisini verður meirluti har. Í Noregi hevur mótstøðan higartil verið rættiliga sterk.

Edmund Joensen, løgmaður, sigur í viðmerking til svensku fólkaatkvøðuna um ES, at úrslitið er merkisvert á mangan hátt – ikki minst søguliga, tí hetta er tað uttanveltaða Svøríki, sum nú hevur gjørt av at fara upp í slíkt bindandi millumlandasamstarv og luttaka í europeiskum politikki.

– Og hetta er eisini ein stór broyting í norðurlandasamstarvinum tá havt verður í huga, at Danmark síðan 1973 hevur verið einsamalt norðurland í ES. Nú eru tvey norðurlond komin aftrat. Tann norðurlendska tyngdin, sum leingi hevur verið talað um, og sum ein hevur mett so týdningarmikla, er nú til staðar í europeiska samstarvinum, sigur Edmund Joensen, løgmaður.

Spennandi heldur løgmaður tað vera, í hvønn mun úrslitið av svensku fólkaatkvøðuni fer at ávirka støðuna í Noregi, har stórur meirluti higartil hevur verið ímóti.

– Tað verður bara kaldari og kaldari at vera uttanfyri. Okkum í Føroyum tørvar norðurlendskt samarbeiði, ikki bara mentunarliga, men eisini búskaparliga. So vit eiga at kanna møguleikarnar, um tað ikki er pláss fyri smátjóðum í ES. EFTA-londini, sum vit hava havt samarbeiði við, fara nú eitt fyri og annað eftir í ES, sigur Edmund Joensen.

Meiningakanningar í Íslandi hava víst, at fer Noreg – sum eins og Ísland er fiskivinnutjóð – í ES, eru íslendingar sinnaðir at søkja um limaskap.

## Í BLAÐNUM Í DAG




### Millum matsið og málteld

Málting og Forlagið Sprotin hava kastað saman í samstarvi um bókaútgávu. Hesaferð er talan um eina nýggja anthologi. Miðnámsskúlarnir sakna mangan tilfar; henda bókin, »Sýnisstubbar«, skuldi fylt holini.

### Nógv fólk á Mikkjalskvøldi

Fríggjakvøldið var Mikkjalsløta í Norðurlandahúsinum, sum Føroya Rithøvundafelag, Bókadeild Føroya Lærarafelags og Norðurlandahúsið skipaðu fyri í felag. Á skránni var kórsangur, upplestur, fyrilestur og føroyskur dansur. Nógv fólk nýttu høvi at vitja í Norðurlandshúsið.

### Alzheimer-sjúkan o.a. líknandi

Í farnu viku skipaði Landssjúkrahúsið enn einaferð fyri skeiði í sambandi við, at 25 ár eru liðin, síðani psykiatriska deild varð sett á stovn her. Trý serkøn innan gerontopsykiatri í Århus greiddu frá demens-sjúkum o.l.

### Treyðir sviar atkvøddu fyri ES

Sviar tóku ávaringarnar frá politikarum og vinnulívsfólkum til eftirtektar og atkvøddu fyri ES limaskapi – um enn treyðugt. 52,2% atkvøddu sunnudagin fyri ES-limaskapi, 46,9% ímóti. Restin atkvøddi blankt. Valluttøkan var 82%.

### Svenskt ja beinir fyri finskum iva

Nú úrslitið av svensku fólkaatkvøðuni um ES fyriliggur, er greitt, at allur ivi Finnlands er beindur av vegnum og at finska tjóðartingið fer at taka vegleiðandi fólkaatkvøðuna har til eftirtektar og staðfesta limaskap frá nýggjárinum.



### Neistin vann bæði kvinnu- og mansdystin

Sunnudagin spældu kvinnuliðini hjá Neistanum og Skála í ítróttarhøllini í Havn. Neistin vann dystin 24-20. Strandingar vitjaðu mansliðið hjá Neistanum og eisini her eydnaðist heimaliðnum at vinna. Úrslitið var 29-24.


**Teldupappír**

**í samanhangandi longdum!**



*Skjót avgreiðsla*

*Kappingarførur prísur*

*Ring tlf. 11212*

Dimmalætting